

vanlukkur, sigur Brynhild, sum hevur serlig evni við fólki, blíð og líkatil. Kanska íbirt av uppvøkstrinum í Skopun í einum systkinaflokki uppá átta.

### Fittir rósumenn

Mannfólk og blómur hoyra onkursvegna saman. Har hevur javnstøðan ikki tikið yvir – enn. Og sjálvandi hevur Brynhild upplivað nógvar góðar við monnum gjøgnum árini. Eitt nú er tað púrasta vanligt, at teir koma á gátt á brúdleypsdegnum og biðja um eina bukett til frúuna, "tí hon hevur brúdleypsdag", sum teir taka til.

- Sum um, at teir ikki eisini sjálvir hava brúdleypsdag, sigur hon og flennir. Ella tá teir blaðungir og nýforelskaðir koma inn fyrstu ferð.

- So stendur hann har, fittur, smæðin og ivandi, og lýtir seg íkring. Tá plagi eg at hjálpa honum eitt sindur og taka nakað soleiðis til: "Nú hava vit aftur ein rósudrong her". So lætnar hann, keypir eina reyða rósu, og fer glaður út aftur.

Eisini hava tey ein fastan kunda, sum javnan kemur at keypa konuni blómur. Men hann er ikki sum hinir, tí hann er so øgiliga góður við hana.

- Hann biður um eina bukett fyri 5.000 krónur. Og hon skal vera í einum, so vit fáa næstan ikki hildið henni saman, forklárar Brynhild, sum onkuntíð hevur spurt hendan sama mannin, um hon ikki heldur skal binda honum fleiri smærri og pynta upp við teimum inni hjá frúuni. Men nei, tað skal vera eitt stórt tyssi hvørja ferð.

- Tað hendir seg eisini, at ein maður kemur inn, sum skal hava okkurt at blíðka konuna við. Tá bindi eg eina sterka bukett við nógvum spískum tornum í, sum hon kann slongja um oyrini á honum, sigur Brynhild og flennir í kíki.

- Nei, tvætl, tað er ógvuliga sjáldan at sovorðið kemur fyri í dag. Tað var vanligari fyrr. Veit ikki hví.

*At vera blómuhandlari er eitt sindur átøkt starvinum sum prestur, soleiðis at skilja, at tú fylgir familjunum í nærumhvørvinum í lívsins og ársins lág- og hátíðum*

### Vælgerandi blómupengar

Seinastu árini hava bert verið tríggir blómuhandlar í býnum. Og hóast býurin man vera tvífaldaður, hava allir úr at gera. Fyrr vóru fleiri

Framhald á næstu síðu